## Súni rakti stongina

Súni Olsen skifti í vetur frá AaB til Viborg at spæla. Høvuðsorsøkin til skiftið var, at Súni slapp ikki á besta liðið hjá AaB, og vónaði hann at sleppa at spæla meira í Viborg. Súni hevur sitið eyka tveir teir fyrstu dystirnar eftir vetrarsteðgin, men á páskum spældi hann við frá byrjan, tá ið Viborg spældi ímóti júst AaB. Viborg tapti dystin, men Súni hevði onkrar góðar royndir á málið – millum annað rakti hann stongina við einum frísparki.



## Jón Rói hugdi at

Jón Rói Jacobsen var partur av hópinum, sum AaB-venjarin tók út til dystin ímóti Viborg fyrsta páskadag, men Jón Rói kom ongantíð á vøllin. Hann kundi hyggja at allar 90 minuttirnar, meðan liðfelagarnir endurvunnu oddasessin í superliguni við einum 2-0 sigri. Bæði málini hjá AaB vórðu skotin í fyrra hálvleiki. Málskjúttar vóru Kasper Risgård og Thomas Enevoldsen.

# Helgi leggur stórt trýst á

**Rani Nolsøe, sum er fyrrverandi FM vinnari og formaður í Talvsambandinum, og sum eisini var við í landsliðsbólkinum hesa ferð, staðfestir, at føroysk telving við nýggja og gávuríka meistaranum ger sovorðið skarvslop, at tað minnir um Bent Larsen í Danmark og Ísland eftir Bobby Fisher og Boris Spasskij**

**FM Í TALVI**
*Jóannes Hansen*



*Hesaferð var talan um sanna valdsdemonstratión av Helga, sigur Rani Nolsøe um nýggja Føroyameistaran*

FM í talvi fyri einstaklingar er av, og merkisvert var tað, hvussu væl yngstu luttakararnir stóðu seg.

Rani Nolsøe er fyrrverandi formaður í Talvsambandinum. Hann var meistari í 1997, og at hann framvegis er aktivur sást, nú hann luttók í landsliðsbólkinum.

Hóast úrtøkan hjá Rana ikki var nakað at reypa hurrá fyri hesa ferð, so fegnast hann um stóru framgongdina, sum kappingin vísti er í føroyskari telving:

- Røgvi Egilstoft Nielsen, sum vann 1. bólk, hevur leingi verið ávegis, og tað verður spennandi at vita, um hann verður førur fyri at veita Helga Dam Ziska mótstøðu. Eg eri eisini øgvuliga spentur uppá, hvussu tað fer at hilnast hjá bara ellivu ára gamla Høgna Egilstoft Nielsen, sum endaði á triðja plássi í unglingabólkinum. Margar Berg og Herborg Hansen eru eisini spennandi telvarar. Men tað er serliga rimmar avrikið hjá Helga Dam Ziska, sum eg haldi vera heilt merkisvert, staðfestir Rani Nolsøe.

*Hvussu tá?*

- Helgi er framúr gávuríkur. Hann lyftir yvirliggjaran í føroyskari telving heilt nógv, og hann leggur stórt trýst á hinar telvararnar. Eingin føroyskur telvari kann rokna við at vinna á honum. Um tað kortini skal eydnast, so er neyðugt við góðum fysikki, nógvari fyrireiking, hollari teoretiskar vitan og øllum hinum, sum skal til. Og skal tað við øllum hesum í viðførinum eydnast at vinna, so skal Helgi samstundis ikki hava ein góðan dag. So góður er hann.

*Hvat vilt tú sammeta hansara avrik við?*

- Tað minnir meg um gjøgnumbrotið hjá Bent Larsen sum fyrsti danski stórmeistarin, og tað minnir meg um, tá ið Ísland var í sonnum talv ævintýri og vann fimm stórmeistarar fyrst í áttati árunum ella í kjalarvørrinum av HM uppgerðini ímillum Bobby Fisher og Boris Spasskij í 1972.

*Verður Helgi Dam Ziska stórmeistari?*

- Tað hevur hann fyritreytir at verða. Eg veit, at hann nú raðfestir studentaskúlan og harvið ikki ferðast so nógv til kappingar, sum hann hevur gjørt. Men eg ivist ikki í, at hann studerar og telvar eina rúgvu. Hann hevur menniskjaligu dygdirnar. Tá meini eg við, at hann er í javnvág, hann er disiplineraður og harmoniskur, fittur, fólkaligur og alt tað, sum skal til. Og so hevur hann eisini øgvuliga stóra styrki sum telvari. Ættarliðið undan honum – Hans Kristian, Olaf, Martin og so Carl Eli – eru dugnaligir, men hesa ferð var talan um sanna valdsdemonstratión av Helga Dam Ziska.

Rani Nolsøe heldur, at tað eru fleiri orsøkir til, at telvingin hevur tað gott í Føroyum í løtuni:

- Talvsambandið við eldhugaða Jógvani Joensen á odda ger eitt stórt arbeiði millum børn og ung. Tað fruktar sjálvandi. Ungdómarnir duga væl at nýta teldurna og internetið í sambandi við talv. Tað er avbjóðandi. Eitt nú fáa tey spennandi og mennandi uppgávur at loysa. Og so vil eg fegin vísa á, at tað framvegis fruktar eftir frambrotið, sum tað var, tá ið Jákup Mikkelsen í síni tíð tók stig til at bjóða Predrag Nikolic og Ivan Sokolov henda vegin í 1992, vísir Rani Nolsøe á.

# Søguligt FM

**FM fyri einstaklingar í talvi varð telvað alla síðstu viku, og gjørdist hetta eitt søguligt FM**

**TALV**
*Ólavur Simonsen*
*olavur@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*



FM fyri einstaklingar verður mett sum størsta kappingin her á landi. Síðan 1972 hevur FM fyri einstaklingar verið undir skipaðum viðurskiftum. Árið 2008 gjørdist eitt søguligt ár fyri FM kappingina.

### Helgi ynskti føroyameistarin

Helgi D. Ziska hevur veruliga havt vind í seglunum seinastu árini, har hann hevur vunnið sær heitið sum altjóða meistari (IM). Helgi var eisini mettur sum favorittur til at vinna FM áðrenn kappingina, og hetta helt hann eisini við at vinna við einum heilum stigi framman fyri Carl E. N. Samuelsen.

Helgi setti eisini eitt nýtt met í føroyskari telving sum ynskti føroyameistari nakrantíð, bert 17 ára gamal. Hetta metið hevur verið órørt í 29 ár, tá toftamaðurin Jens Chr. Hansen í 1979 setti hetta metið bert 18 ára gamal.

### Herborg fyrsta kvinnan

Aldri er tað hent áður, at ein kvinna vinnur føroyameistaraheitið í talvið. Í ár luttóku tvær kvinnur í unglingabólkinum, og eydnaðist tað 17 ára gomlu Herborg Hansen úr Klaksvík at vinna bólkin bert hálvt stig framman fyri Heiðrik T. Jacobsen.

### Herborg elsti vinnarin

TSF hevur seinnu árini lagt sera nógv arbeiði í at styrkja ungdómstelvingina, og má hetta sigast at hava borið ávøkstur í ár. So løgið sum tað ljóðar, so gjørdist unglingaføroyameistarin elsti vinnarin í kappingini. Vinnarin av Landsliðsbólkinum gjørdist Helgi D. Ziska bert 17 ár, vinnarin av 1. bólki gjørdist Røgvi E. Nielsen 15 ár, vinnarin av Almenna bólkinum gjørdist Margar Berg 16 ár, og vinnarin av unglingum gjørdist Herborg 17 ár, ið er ein mánað eldri enn Helgi.

### Fyrstu feðgarnir

Eisini er hetta fyrstu ferð, at faðir og sonur eru komnir í FM røðina. Andrias Ziska, ið er faðir Helga D. Ziska, vann føroyameistaraheitið í 1983. So meðan faðirin helt 25 ára jubileum, dró sonurin enn eitt FM heitið inn í familjuna.

Tó skal sigast, at í 1938 stóð skrivað í Sosialinum: "tann, sum ikki vil góðkenna J.P. Hendriksen sum føroyameistara í talvi, má sum skjótast venda sær til Havnar Telvingarfelag fyri at fáa í lag kapptelving við hann". J.P. Hendriksen var tá mettur sum føroyameistari, og seinni var sonur hansara, Jákup Hendriksen, eisini ein at sterkastu telvarunum. Men hann er ikki skrásettur sum føroyameistari, hóast søgan ikki sigur nógv um árini frá 1956 til 1971.

Men tá hugsað verður um almennu FM kappingina, er hetta ikki hent áður.